90 SEKUND

LAGT TIL RÆTTIS: Inna Törnroos

# CARL JÓHAN JENSEN



FAKTA **CARL JÓHAN**

**Navn:** Carl Jóhan Jensen
**Aldur:** 52
**Bústaður:** Tjarnarlág í Havn
**Starv:** Rithövundur, týðari v.m.
**Familja:** Konu og tveir synir. Tey eita Kate Sanderson, Eirikur Sanderson og Jóhan Friðrikur Sanderson

MYND: JENS KRISTIAN VANG

# Føroyingar tosa óvanliga nógv um **sjáldsama** lítið

**Hvat er eitt gott lív?**
Eitt lív við ongari tannapínu og góðum skaldskapi.

## Hvat hevur lívið lært teg?
At meira tú veitst, tí minni veitst tú við vissu.

**Hvør er besta bók tú hevur lisið?**
Tað man vera ein, ið eg vónandi ikki havi lisið enn. Koranin kanska.

**Hvat er tað besta við at búgva í Føroyum?**
At sleppa undan at gera mær hövuðbrýggjum, hvar eg annars skuldi búð.

**Hvat er tað ringasta við at búgva í Føroyum?**
Hetta övuta lagið, at í alt ov nógvum viðurskiftum halda alt ov nógvir føroyingar, at undirlutakenslan er portrið til himmiríki á jörð.

**Hvør er mest inspirerandi persónur tú hevur hitt?**
Eg veit ikki...men Töroddur Poulsen er eitt boð ið hvussu er

## Hvat heldur tú at føroyingar tosa ov nógv um?
Í Føroyum siga fólk treyðugt nakað, sum tey so ella so kunnu ábyrgjast fyri sjálv.

**Hvat tosa føroyingar ov nógv um?**
Sum seg segði í áðni fólk halda yvirhövur tað, sum tey halda at onnur halda. Tí tosa føroyingar eisini óvanliga nógv um sjáldsama lítið.

**Hvat er størsti brølarin sum er gjørdur í Føroyum?**
Tað valdast, hvat brölari er. Er hetta føroyska navnorðið leitt av sagnorðinum at *bröla*, kundi tað, eyðvitað, verið ein ávísur harramaður av Glyvrum. Er brölari hinvegin danskt tökuorð fyri mistak, er spurningur ikki, hvat ið gjørt er, men hvat ið ongantíð fekst upp í lag í Føroyum.

**Hvat ger teg glaðan?**
Lat meg brongla Brecht gamla eitt sindur og siga: Tvørsagnir, tær eiga vónina í okkum og láturin.

**Hvat ger teg illan?**
Tað slagið av tvørsagnarloysi, sum á mannamunni eitur: idioti.

**Hvør er tín lívrættur?**
Allur matur, uttan tun-fiskur og havragreytur.

**Hvat hevði tú gjørt um tú var ósjónligur ein dag?**
Bíðað til eg varð sjónligur aftur.

## Hvat óttast tú?
Oftast tað, sum ikki er vert at óttast. Eg eri ikki føroyingur fyri einki.

**Hvat er títt besta ráð til løgmann?**
Sig einki og ger uppaftur minni.

**Um tú slapp at liva lívið umaftur, hvat hevði tú gjørt?**
Sjálvmorð, frykti eg fyri.

**Hevði tú hugsa tær at búð nakra aðrastaðni enn í Føroyum? Um ja, hvar?**
Nei. Tvørsögnin bindur meg her á klettunum sum ein annan Prometheus